

www.oljan.fo

**Jan Müller** 18 - 06 - 2013

# Oljuíløgur í Norra seta met í 2013

Hóast norska oljusøgan skjótt hevur fimti ár á baki, so er einki, sum bendir á, at minni áhugi er fyri at gera íløgur í oljuvirksemi á norska landgrunninum. Heldur beint tvørturímóti. Og hetta eru eisini tey bæði føroysku oljufeløgini, Faroe Petroleum og Atlantic Petroleum, eitt gott dømi um. Tey fingu herfyri fleiri nýggj leitiloyvi í norskum øki. Oljufeløg, sum longu arbeiða á norska landgrunninum, fara helst at seta íløgumet í hesum árinum og røkka 211,3 mia. kr. Hetta er hægsta talið nakrantíð. Mett verður tó, at talið verður nakað minni í 2014. Sambært Dagens Næringsliv er serstakliga talan um íløgur í verandi framleiðandi olju- og gasskeldur, men eisini útbyggingar av nýggjum keldum, leiting og flutning av rørleiðingum. Talan verður tó um eina minni minking í 2014 og fer hon serstakliga at síggjast aftur í minni leitivirksemi.